**LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR**

Tórshavn, tann 24. juni 2008
J.Nr.: 200700007 / 119
(at tilskila í svari)

**Frágreiðing**
viðvíkjandi uppfylging av eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14

Í frágreiðing, dagfest 15. juni 2007, frá eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi, ið var framd tann 27. februar 2007, bað umboðsmaðurin Sambýlið á Bóndaheygi, Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðið um at lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Eisini heitti umboðsmaðurin á landsstýrismannin í innlendismálum, um at skipa so fyri, at revsi- og rættargangslóg varð dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi varð tryggjað.

Við skrivi, dagest 11. mai 2007, boðaði Innlendismálaráðið umboðsmanninum frá, at ætlanin var at dagføra revsilógina, og leggja uppskot hesum viðvíkjandi fyri Løgtingið á heysti 2007. Í tann mun, at broytingar skuldu gerast í rættargangslógini orsakað av broytingunum í revsilógini, skuldi hetta eisini verða gjørt.

Við skrivi, dagfest 22. november 2007, bað umboðsmaðurin Innlendismálaráðið greiða sær nærri frá, hvat síðani var hent í málinum.

Tann 11. desember 2007 sendi Innlendismálaráðið soljóðandi skriv til umboðsmannin:

> ”**Viðv. eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14.**
>
> Vísandi til skriv tygara, dagfest tann 22. november 2007, um uppfylging av málinum um eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14, skal verða sagt frá, at arbeiðið, sum Innlendismálaráðið hevur biðið ríkismyndugleikarnar um at gera, er steðgað upp, orsakað av at løgtingsval er útskrivað.
>
> Innlendismálaráðið ætlar sær at taka málið upp aftur við ríkismyndugleikarnar beinanvegin aftaná, at nýtt landsstýrið er skipað.
>
> Víst verður annars til skriv, dagfest tann 11. mai 2007.”

TRAÐAGØTA 43 • POSTSMOGA 2008 • 165 ARGIR
TELEFON 35 85 00 • TELEFAX 35 85 01 • E-MAIL: LUM@LUM.FO

Við skrivi, dagfest 22. november 2007, bað umboðsmaðurin Almanna- og heilsumálaráðið um at senda sær eina frágreiðing um, hvat síðani var hent í málinum viðvíkjandi teimum áheitanum v.m., ið umboðsmaðurin kom við til bæði Sambýlið, Nærverk og Almanna- og heilsumálaráðið.

Tann 10. januar 2008 sendi Almanna- og heilsumálaráðið soljóðandi skriv til umboðsmannin:

> ”**Viðvíkjandi eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14**
>
> Í skrivi tann 22. november 2007 frá Løgtingsins umboðsmanni verður spurt, hvat er hent í málinum viðvíkjandi teimum áheitanum, tilmælum v.m, ið umboðsmaðurin kom við til sambýlið á Bóndaheygi 14, Nærverkið og Almanna- og heilsumálaráðið í frágreiðingini frá eftirlitsvitjanini.
>
> Í frágreiðingini hjá umboðsmanninum varð heitt á landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum um at gera fylgjandi:
>
> - tilevna tíðarhóskandi reglur um útferðarloyvi til persónar, ið hava dóm til uppihald á stovni,
> - orða ásetingar um frælsistøku í lóg, harundir um ávaringarskipanir,
> - fáa reglur settar í verk viðvíkjandi umsiting av pengum og ognum hjá búfólki, umframt at útgreina hugtakið pedagogiskur stuðul í gomlu reglugerðini.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur arbeitt við at fáa sett í verk reglugerð um umsiting av pensjón hjá búfólkum og aðrar reglur um virksemi á sambýlum. Hesar reglur verða væntandi klárar at seta í verk í vár.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur tó ikki havt orku til at endurskoða galdandi reglur um frælsistøku og at orða hesar í lóg. Heldur ikki hevur orka verið til at orða nýggjar ásetingar í galdandi lóggávu um innihaldið á stovnunum, eins og Nærverkið hevur víst á, at tørvur er á at gera. Óvist er, nær orka verður til at gera hetta arbeiðið.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur arbeitt við at fyrireika, at danska psykiatrilógin verður sett í gildi í Føroyum. Psykiatrilógin kemur tó bert at fevna um uppihald á psykiatriskum deildum og ikki um uppihald á samdøgurðsstovnum. Í hesum sambandi ber møguliga til eisini at seta kunngerð hjá danska løgmálaráðnum um útferðarloyvi til persónar dømdir til uppihald á sjúkrahúsi ella á stovn (kunngerð nr. 200 frá 25. mars 2004) í gildi í Føroyum. Fortreytin fyri hesum er tó, at heimild eisini er í revsilógini og rættargangslógini, ið innlendismálaráðið varðar av.
>
> Viðmerkjast skal, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum tók málið um rættartrygd hjá menningartarnaðum upp á landsstýrisfundi tann 23. oktober 2007. Sambært frásøgn frá landsstýrisfundi varð upplýst, at innlendismálaráðið arbeiðir við at broyta bæði revsilógina og sonevndu Værgemålslógina.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur heitt á Nærverkið um at koma við eini frágreiðing um, hvat er hent í málinum í mun til tær áheitanir og tey tilmæli, ið umboðsmaðurin kom við til sambýlið á Bóndaheygi 14 og til Nærverkið.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur fingið frágreiðing frá leiðaranum fyri sambýlið á Bóndaheygi 14. Í frágreiðingini verður greitt frá ymiskum átøkum, ið stovnurin hevur gjørt og tikið stig til at gera.
>
> Almanna- og heilsumálaráðið hevur eisini fingið eina stutta statusfrágreiðing í málinum um uppafturtøku av dóminum hjá A. Nærverkið hevur tó í løtuni ikki starvsfólkaorku til

at koma við frágreiðing í málinum í mun til áheitanir og tilmælir annars í frágreiðingini hjá umboðsmanninum. Tá ið frágreiðingin frá Nærverkinum fyriliggur, verður henda send til Løgtingsins umboðsmann.

Hjáløgd skjøl:
Frágreiðingin frá leiðaranum fyri sambýlið á Bóndaheygi 14
Statusfrágreiðingin í málinum um uppafturtøku av dóminum er hjáløgd"

Hjálagt skrivinum frá Almanna- og heilsumálaráðnum, var soljóðandi frágreiðing frá Sambýlinum á Bóndaheygi 14, dagfest 11. desember 2007:

"Frágreiðing í samband við umboðsmannavitjanina á Bóndaheygi 14, tann 27. februar 2007.

**Kap. 2,1 Starvsfólk.**
Starvsfólkasamansetingin á sambýlinum er broytt. 1 pedagogur er í barsilsfarloyvi, avloysarin fyri hana er nú eisini í barsilsfarloyi, 1 hjálparfólk er sett í hetta starv fram til juli 2008. Pedagogurin er nú í longdum farloyvi uttan løn.

1 hjálparfólk hevur fingið annað starv og hevur sagt upp. 1 hjálparfólk er sett í hetta starv.
1 hjálparfólk í pedagogstarvi er farið at lesa til pedagog. Hetta starv er ikki sett, tí eingin pedagogur søkti. Vit umhugsa nú at søkja eftur fólki við royndum innan psykiatriska økið, eitt starvsfólk við heilsurøktaraútbúgving.

**Kap. 3,1 Búfólk við dómi.**
Støðulýsing verður í løtuni skrivað um dømda (A), hon er ikki endaliga liðug og virkisætlanin er somuleiðis ávegis. Hetta er eitt sera umfatandi arbeiði, sum tekur tíð og sum mátti gerast av nýggjum, tí teldan gekk fyri, sum allar upplýsingar vóru goymdar á.

Útiloyvini hjá dømda (A) eru víðkaði og hann gongur nú sjálvur í kvøldskúla á Verkstaðnum Vón. Hann gongur út á Vón, ringir heim og boðar frá at hann er komin uppá pláss. Áðrenn hann gongur heim aftur, ringir hann somuleiðis og boðar frá. Hetta hevur eydnast væl. Viðgerðarfundur, har feriur og loyvir vóru avtalaði, var hildin á vári 2007. Loyvini eru øll komin uppá pláss frá fútanum.

Tosað hevur verið um at søkja í góðari tíð um at dømdi (A) kann sleppa á skíferð í 2009. Halda tó at okkum tørvar hjálp til at gera hetta á rættan hátt. Kanska fútin kann vegleiða okkum?

Dømdi (B) hevur gott og regluligt samband við mammu sína og hevur ferðast til Suðuroyar at vitja familjuna í ferium. Mamman hevur gist onkrar dagar í sambýlinum hjá (B). Hetta hevur alt eydnast sera væl. Viðgerðarfundur var hildin í heyst. Umsøkn um ferðaloyvi saman við avriti av frásøgnini verður sent Trivnaðartænastuni ein av døgunum. Tá starvsfólk er sett í ta leysa pedagogstarvið, verður støðulýsing um dømda (B) eisini gjørd saman við virkisætlan.

Dømdi (B) ynskir at sleppa á skíferð í mars 2008 og er tilmeldaður. Eitt starvsfólk fer við.

**Kap. 3,3 Valdsnýtsla og harskapur ímóti starvsfólki.**
Likamlig valdsnýtsla verður framyvur fráboðað Nærverki. Harðskapur og hóttanir verða niðurskrivað, so hetta kann skjalprógvast framyvur. Lítið hevur verið av harðskapi seinastu tíðina. Tað sum er farið fram er skrivað í dagbøkurnar, og starvsfólk hevur verið sett inn, tá vit meta tað neyðugt. Hetta virkar fyribyrgjandi eftir okkara meting.

Leiðslan á BH14 hevur havt fund við Tilbúgvingarstovuna, v/Jógvan Jensen, um at gera eina tilbúgvingarætlan fyri stovnin. Tveir fundir hava verið um hetta. Vit hava fingið tilfar um skeið fyri starsfólki og hava biðið um eitt kostnaðaruppskot og eina tíðaráseting. Hetta er ikki komið enn, og vit hava frætt at teir eru ógvuliga upptiknir av øðrum uppgávum.

Viðvíkjandi fartelefonum hava vit ikki frætt nakað enn. Vit meta framvegis, at tørvur er á at hava eina fartelefon í vaktarrúminum, og at bæði leiðari og varaleiðari eiga at hava eina fartelefon. Vit hava eina fartelefon, sum vit hava lænt frá meginskrivstovuni á Nærverki. Okkum manglar umframt, at fáa loyvi at keypa eina korttelefon til vaktarrúmið.

**Kap. 4 Dagliga virksemi hjá búfólkunum.**
Nevnt er, at sambýlið áður hevur havt reglugerðir fyri starvsfólk, hetta fara vit at taka uppaftur samstundis sum vit fara at skipa dagbøkurnar á nýggjan hátt.
Vit fara at hava eitt ringbind til hvørt búfólk, har allar relevantar upplýsingar eru skipaðar, m.a. dagbók, heilivágur, læknavitjanir, niðustøður av ymiskum slag, reglugerðir og avtalur. Vit kundu ynskt okkum eina farteldu til hesa skipanina.

Arbeiði. 2 búfólk hava nú aftur arbeiði á Vón 2 dagar um vikuna. 1 búfólk byrjar aftur at arbeiða á Vón eftir nýggjár 4 dagar um vikuna, um hann orkar tað. Arbeiðið í Summarhúsinum er steðgað frá 1. oktober í ár. 2 búfólk hava einki arbeiðstilboð. Tey hava søkt Vón um pláss, men har er eingin møguleiki í løtuni.
Fundur hevur verið við Vón um møguleikan at sleppa í praktikk, men eingin niðurstøða er gjørd. Vit frætta aftur.

Viðvíkjandi virkisætlanum, so eru ynskini hjá búfólkunum sera ymisk, og ymiskt er, hvussu langt er á mál. Arbeitt verður við hesum í samband við at støðulýsingarnar verða gjørdar.

Mikudagarnir, sum eru heimadagar eru undir umskipan, og lagt er upp til, at starvsfólk saman við búfólki hava samrøður, arbeiða við virkisætlanum, gera reint og klára persónlig viðurskifti, gjøgnum vikuna. Lagt er upp til, at kontaktfólk fer til lækna við búfólkunum, fyri at skapa størri samanhang.

**Kap. 5,1 Umsiting av heilivági.**
Øll fimm búfólkini fáa nú heilivág í skamtanarposum. Mannagongdirnar um heilivág verða fylgdar.
Øll búfólkini eru nú í skipanini hjá psykiatriska deplinum og fáa bjóðað samrøður har.
Landslæknin hevur verið á eftirlitsvitjan. Hetta var gott og gevandi, og vit fingu eina betri fatan av, hvussu vit skipa okkara innaneftirlit framyvur.
Dagbøkurnar vóru nevndar, og at tað er umráandi at gera notat, um feilir vera gjørdir. Vit fingu rós fyri gott skil.

**5,3 Royking.**
Vit hava einki svar fingið uppá umsókn um útsúgving.

**Kap. 6,1 Varveitsla av persónligum upplýsingum.**
Leiðslan á BH14 hevur verið á tveimum fundum við Landskjalasavnið, John Kjær, um skjalagoymslu. Eitt uppskot er gjørt til eina manuella journalskipan. Landskjalasavnið hevur boðið okkum at koma á stovnin at leggja lag á. Vit mugu keypa eitt stempul og so fara í gongd í nýggja árinum.
Annars eru øll skjøl nú skipaði í einum arkivskápi, sum er læst. Vit mangla eitt skáp/skuffu til starvsfólkaupplýsingar, serliga nú vit eru í holt við starvsfólkasamrøður.

**6,2 Samskifti.**
Teldan, sum starvsfólk og búfólk høvdu atgongd til, gekk fyri og vit mistu allar upplýsingar og roknskapir hjá búfólkunum. Vit hava eftir vegleiðing frá Nærverki keypt

eina nýggja teldu, sum er tengd at terminalskipanini. Her hava bert starvsfólk atgongd, sum eru sett í starv á sambýlinum. Búfólk hava onga teldu, og ADSL haldið er strikað. Dagbøkurnar eru lagdar í eina skuffu, og hurðin er stongd tá einki starvsfólk er har. Øll eru kunnaði um, at dagbøkurnar eru persónligar, og at búfólk bert sleppa at lesa tær saman við starvsfólki.

**Kap. 9. Rundtúrur.**
Leiðslan á sambýlinum hevur á fundi við C, umboð fyri sjálvsognarstovnin, sum eigur húsini sambýlið heldur til í, nevnt øll viðurskifti, sum vit ynsktu umvald, umframt at hann er kunnaður um øll viðurskifti, sum umboðsmaðurin hevur gjørt vart við í frágreiðingini. Tað mesta er umvalt og komið á mál, tó eru nøkur ting eftur, sum eingin niðurstøða er gjørd um, og nøkur ting sum mangla.

**Kap. 9,2 Loftið. Íbúð nr. 1.**
Brandtrappan frá ovastu hæddini í sambýlinum er ikki broytt. Sagt var, at júst hendan trappan er sett upp fyri at taka fyrilit fyri, at fólk við breki skulu brúka hana. Vit ivast tó í, um hon er nóg trygg.

**9.3 Miðhæddin. Íbúð nr. 2.**
Skápið í køkinum er ikki umvælt, og skápshurðarnar eru ikki málaðar. Hurðin til stovuna í hesari íbúð er brotin og skuldi skiftast út. Hetta er ikki gjørt. Leiðarin á BH14 hevur fleiri ferðir spurt, nær hetta verður gjørt, men einki svar er uppá henda spurning.

**Íbúð nr. 3.**
Alt arbeiði er liðugt í hesari íbúð, tó mangla framvegis listar til vindeyguni. Har trekkir illa. Leiðarin á BH14 hevur fleiri ferðir spurt, nær hetta verður gjørt, men einki svar er uppá henda spurning.

**Baðirúm til íbúð 1, 2 og 3.**
Karmurin er settur upp, so arbeiði er liðugt.

**Vaktarrrúm.**
Viðvíkjandi burturflytingarætlan, so hevur leiðarin sent skriftligan fyrispurning til brandstøðina í Havn, um at skipa fyri einum skeiði ella eini roynd í sambýlinum. Vit hava einki svar fingið uppá hendan fyrispurning.

**Starvsfólkarúm.**
Hetta rúm er nú tikið uppí stovuna hjá búfólki í íbúð nr. 2. Starvsfólk hava einki serstakt starvsfólkrúm. Lekin er umvældur.

**Gongd í miðhædd.**
Ábøtur eru gjørdar í gongini, men gáttirnar eru leysar. Tað er roynt at festa hesar, men tær loysna aftur so hvørt. Vildi mett tað var best, um tær vóru tiknar burt.

**9.4 Kjallarin. Íbúð nr. 4.**
Íbúðin er málað, radiatorurin er umvaldur, viftan er sett upp í køkinum. Skáp eru tikin niður í køkinum, so har er betri pláss fyri koyristólinum.

Búfólki hevur fingið ein el-koyristól, sum tekur munandi meira pláss enn hin vanligi koyristólurin. Hurðarnar eru tiknar av inn á WC og sovikamarið, so har er atkomuligt, men ikki serliga hugnaligt. Vit hava søkt um at betra munandi um umstøðurnar í hesari íbúð, men vit eru ikki komin á mál. Nógvar samrøður hava verið um hetta millum leiðaran og sjálvsognarstovnin. Tað hevur tikið langa tíð, og nógv orka er brukt uppá hetta.

Heilsustøðan hjá hesum búfólki stendur við og versnar, og tað er sera trupult hjá starvsfólki at hjálpa viðkomandi, serliga tí har er ov trongt, tí íbúðin ikki er egnað til fólk við koyristóli.

...
Vit hava biðið um at fáa baðirúmið gjørt størri, eftir drúgva tíð er hetta játtað, men vit skulu sjálvi skaffa tvey tilboð uppá arbeiði, og síðani senda tað til sjálvsognarstovnin.
Samanumtikið er tað ivasamt, um tað er gjørligt at umvæla íbúðina, soleiðis at búfólki kann blíva búgvandi har.
Leiðarin metir ikki, at búfólkið í íbúð nr. 4 er egnað at búgva í sambýlinum longur. Hann er alt ov sjúkur og kropsliga brekaður til, at tað er forsvarligt.
...
Sjúkugongdin er greið og verður ikki betri aftur, bert versnandi. Búfólki er ósikkur uppá, hvat tað inniber at flyta, so hann ynskir at búgva í sambýlinum á BH14. Tilmæli frá leiðsluni og starvsfólki er, at búfólkið bráfeingis sleppur at flyta í betri umstøður, møguliga á røktarheim.

**Gongd og trappur í kjallara.**
Eftir at hava tosað við sjálvsognarstovnin um eina lyft upp í miðhæddina, var sagt, at hetta kemur ikki uppá tal.
Viðvíkjandi motorkoyristólinum, so er hann latin aftur til hjálpitólarmiðstøðina.

**Fýrrúm.**
Mát er tikið til at gera ein skráa inn í fyrrúmi, men einki er hent víðari í málinum.

**9,5 Húsið og økið uttandura.**
Hjálpitólarmiðstøðin metir, at skráin út av húsinum er ov brattur til koyristól. Sjálvsognarstovnurin sigur, at tað er sera kostnaðarmikið at asfaltera rundanum húsini. Hóast tað, metir leiðarin á BH14, at hetta hevði betrað um møguleikarnar at brúka økið rundanum húsini, fyri øll í húsinum.

**Viðmerkingar frá leiðaranum um viðlíkahald.**
Seinastu tíðina hava vit havt trupuleikar av, at ljósið fer í fleiri rúmum, og summa staðni nyttar tað ikki at skifta perurnar, vit fáa ikki ljósið at tendra aftur. Ongir lampuskermar eru í felagsrúmunum í húsinum yvirhøvur.
Vit kundu ynskt, at árligt eftirlit var við húsinum, so viðlíkahaldið altíð er í topp.
Sera nógv tíð er farin við at fáa viðlíkahaldið uppá pláss, og tað krevur nógva orku og nógvar leiðslutímar, tá eingin føst skipan er, og vit sjálvi skulu finna hondverkararnar.
Eg má viðganga at tað er ikki lætt, at fáa tilboð uppá smáarbeiðir, og eg veit ikki, hvar eg skal venda mær. Loyvi mær at ivast ͺ um tað er uppgávan hjá leiðaranum í sambýlinum."

Hjálagt skrivinum frá Almanna- og heilsumálaráðnum var eisini soljóðandi statusfrágreiðing, dagfest 20. desember 2007:

"*Status í málinum viðvíkjandi mentalkanning av A:*
Fútin hevur biðið Nærverkið um eina frágreiðing um støðuna hjá A. Trivnaðartænastan hevur skipað fyri eini hoyring 4. desember 2007, og ein frágreiðing er við at blíva gjørd í hesum sambandi. So skjótt frágreiðingin er liðug, verður hendan eftir avtalu send fútanum til víðari viðgerðar."

Tann 22. november 2007 sendi umboðsmaðurin skriv til Nærverk, har biðið var um frágreiðing í málinum. Í ummælisskrivi sínum, dagfest 10. januar 2008, boðaði Almanna- og heilsumálaráðið frá, at frágreiðingin hjá Nærverk ikki enn var liðug, men at frágreiðingin varð send umboðsmanninum so

skjótt hon var liðug. Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá Nærverk, sendi umboðsmaðurin, tann 15. apríl 2008, eina áminning til Nærverk.

Tann 24. apríl 2008 sendi Nærverk umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

**"Viðvíkjandi uppfylging av eftirlitsvitjan í Sambýlinum á Bóndaheygi 14, Tórshavn**
Víst verður til skriv tygara, dagfest ávikavist 22. november 2007 og 15. apríl 2008, har Nærverkið verður biðið um at greiða frá, hvat víðari er hent viðvíkjandi teimum áheitanum og tilmælum, ið umboðsmaðurin kom við í frágreiðing frá eftirlitsvitjan framd tann 27. februar 2007 í Sambýlinum á Bóndaheygi 14, Tórshavn.

Vísast skal harumframt til hoyringsskrivi, dagfest 6. juni 2007, har Nærverkið gjørdi viðmerkingar til omanfyri tilsipaðu frágreiðing.

Fylgjandi verða punktini, ið eru Nærverkinum beinleiðis viðkomandi, umrødd.

**Pkt. 2.2. Búfólk**

**Viðv. samansetingini av búfólkum**
Nærverkið boðaði í omanfyri nevnda hoyringsskrivi frá, at samansetingin av búfólkum fór at verða umhugsað, tá nýggj fólk skuldu flyta inn í Sambýlið á Bóndaheygi 14. Víst varð eisini á møguleikan fyri at flyta búfólkini, ið hava dóm, á ein stovn, ið serliga var stovnsettur og egnaður til endamálið.

Viðvíkjandi møguleikanum fyri at flyta búfólk við dómi á serstakan stovn, má Nærverkið ásanna, at hetta ikki er ein gongd leið sum er, tá talan bert er um tvey búfólk.

Grundgevingin fyri hesum er, at Nærverkið, umframt onnur atlit støðugt má taka fíggjarlig atlit, ið m.a. skulu tryggja, at játtanir verða hildnar, og er ein stovnur fyri einans tvey búfólk ov kostnaðarmikil og als ikki fíggjarliga ráðiligur.

Annað atlit, ið talar ímóti omanfyri nevnda møguleika, er trupulleikin við vantandi arbeiðsorku, havandi í huga metlága arbeiðsloysi, ið fevnir um øll starvsøki í landinum. Hetta er eisini ein trupulleiki, ið Nærverkið merkir avleiðingarnar av.

Í sambandi við at eitt av búfólkunum fekk annað og fyri viðkomandi meira hóskandi búpláss, varð ein íbúð tøk á sambýlinum.

Annað búfólk, sum í løtuni bíðar eftir dómi fyri eldáseting á sambýli, har viðkomandi fyrr var búfólk, er flutt inn í umrøddu íbúð, og verður mett, at sambýlið á Bóndaheygi 14, við teimum kørmum, herundir eldávaringarskipan, ið sambýlið hevur at bjóða, er væl egnað til viðkomandi.

Nærverkið vil framhaldandi, í tann mun tað er gjørligt, arbeiða við at samanseta búfólk á ymisku stovnunum og sambýlunum við atliti til, hvussu ymisku búfólkini hóska saman, við tí endamáli fyri eyga, at øll búfólk hava virðilig og, fyri tann einstaka, hóskandi kor.

**Pkt. 3.1.Búfólk við dómi**

**Viðv. útferðarloyvi**
Sum fráboðað í hoyringsskrivinum, hevði Nærverkið ætlan um at taka upp samstarv við Psykiatriska depilin fyri at fáa eina læknaliga/fakliga meting, ið skal liggja til grund, tá avgerð um útferðarloyvi skal takast.

Nærverkið fylgir framvegis tí mannagongd, at tað er leiðarin fyri Trivnaðartænastuna, ið við støði í pedagogiskt fakligum úttalilsum frá starvsfólkunum á stovninum, tekur avgerð um tilmæli til fútan viðvíkjandi útferðarloyvum.

Nærverkið hevur fult álit á, at tey starvsfólk, ið eru um teir dømdu til dagligt, eru bæði fakligt og annars, við støði í royndum teirra á økinum, sera væl skikkað til at geva eina álítandi meting um støðuna hjá búfólkunum.

Málið er tó framvegis at fáa avtalu í lag við Psykiatriska depilin, soleiðis at tað er ein læknalig faklig meting, ið liggur sum høvuðsgrund, tá avgerð um útferðarloyvi skal takast.

Viðmerkjast skal tó, sum tað framgongur av frágreiðingini niðanfyri um uppafturtøku av dómum, at tann dømdi (A) í løtuni gongur til ambulanta viðtalu á Psykiatriska deplinum, við tí endamáli, at ein støðulýsing skal gerast.

**Viðv. støðulýsing**

Sum Nærverkið fyrr hevur víst á, er ynskiligt, at støðulýsing av búfólkunum við dómi verður gjørd árliga.

Hesin málsetningur hevur tó verið trupul at rokkið, tí stovnurin í fleiri ár hevur verið merktur av skiftandi leiðslu sum avleiðing av, at setti leiðarin er í farloyvi fyri at kunna røkja starvið sum formaður í Pedagogfelagnum.

Nærverkið metir, at tað er ein óhaldbar støða fyri sambýlið, at ongin føst leiðsla er, tí ov nógv arbeiði so sum við menning og trivnaði steðgar upp ella dettur heilt niðurfyri sum avleiðing av hesi støðu.

Fyri at koma omanfyri nevndu trupulleikum til lívs, verður mett, at ein føst leiðsla má verða á stovninum, og hevur Nærverkið umrøtt hetta við setta leiðaran. Arbeitt verður tí í løtuni við at finna eina nøktandi loysn fyri allar partar. Gongd er í hesum máli.

Í sambandi við, at fútin er í ferð við at taka dómin hjá tí dømda (A) upp til endurskoðan, er sambært leiðsluni á sambýlinum ein støðulýsing av viðkomandi ávegis.

**Viðv. uppafturtøku av dómum**

Sum nevnt omanfyri, er fútin farin undir at taka dómin hjá tí dømda (A) upp til endurskoðan.

Í hesum sambandi gongur viðkomandi til ambulanta viðtalu á Psykiatriska deplinum, fyri at støðulýsing skal verða gjørd, ið skal liggja til grund fyri avgerðini hjá fútanum um uppafturtøku av dóminum.

Viðvíkjandi mannagondini í samband við uppafturtøku av dómum, er Nærverkið av somu áskoðan sum umboðsmaðurin, tí mett verður, at leiðslan á sambýlinum má verða nærmast til at meta um, um tað er ráðiligt at taka uppaftur til viðgerðar dómarnar hjá teimum dømdu.

Sambært fútanum hevur Nærverkið, herundir sambýlið, tó ikki formliga heimild til at heita á fútan um at taka ein dóm upp til viðgerðar, og hevur ein áheitan frá Nærverkinum tí ongan veruligan týdning.

**Pkt. 3.3. Valdsnýtsla / harðskapur ímóti starvsfólki**

Nærverkið er í løtuni í ferð við at gera eina umfatandi kanning av einum tilburði av valdsnýtslu móti einum búfólki á einum av sambýlum Nærverksins.

Sum óbeinleiðis avleiðing av hesi kanning er komið undan kavi, at kunnleikin til hugtakið valdsnýtsla als ikki er nøktandi innan ymisku økini í Nærverkinum, og hevur Nærverkið tí sum málsetning, at øll starvsfólk skulu hava grundleggjandi kunnan um evnið.

Fyri at røkka hesum málsetningi, er arbeiðið við at gera eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri øll øki innan Nærverkið farið í gongd.

Tilbúgvingarætlanin kemur at fevna um undirvísing í m.ø. muninum á valdsnýtslu og harðskapi, fráboðanarskyldu og rættindunum hjá bæði brúkara og starvsfólki.

Harumframt er eisini samstarv við yvirlæknan á Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, temadagar o.a. við í tilbúgvingarætlanini.

**Pkt. 5.1. Umsiting av heilivági**

**Viðv. innaneftirliti við heilivágsgoymsluni**
Heimatænastan undir Nærverkinum hevur orðað mannagongdir fyri umsiting og geving av heilivági, og nýtir eisini landslæknin hesar í sambandi við heilsufakliga eftirlitið, ið er umrøtt niðanfyri.

Trivnaðartænastan er farin undir arbeiðið við at tillaga og seta í verk somu mannagongdir sum Heimatænastan, fyri allar viðkomandi stovnar undir Trivnaðartænastuni, og er hetta arbeiðið komið væl áleiðis.

Sum omanfyri nevnt, nýtir landslæknin umrøddu mannagondir, tá heilsufakligt eftirlit verður framt, og er hetta viðvirkandi til, at formligt eftirlit nú er við goymslu, umsiting og geving av heilivági.

**Viðv. heilsufakligum eftirliti**
Sum tað framgongur av endaligu frágreiðingini hjá umboðsmanninum frá eftirlitsvitjanini á Bóndaheygi 14, hevur Nærverkið avtalu við landslæknan um heilsufakligt eftirlit á øllum stovnum Nærverksins. Umrødda eftirlitið varð á fyrsta sinni gjøgnumført yvir trý ár, t.v.s 2005 – 2007. Ultimo 2007 hevði landslæknin framt heilsufakligt eftirlit á øllum stovnunum hjá Nærverkinum. Eftirlitini vórðu framd, so hvørt fíggjarligu ráðini loyvdu tí.

Nærverkið hevur eftir samráð við landslæknan ætlanir um, at skipað, heilsufakligt eftirlit skal verða á stovnunum annað hvørt ár. Hetta er tó treytað av, at umbidna játtanin áljóðandi 200.000 kr. á fíggjarlógini fyri 2008 verður veitt.

**Pkt. 5.3. Royking**

**Viðv. roykipolitikki fyri felagsøkir**
Sambýlið á Bóndaheygi 14 er ein almennur stovnur og tí fevndur av § 4 í løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2005 um tiltøk at minka um tubbaksnýtsluna.

Útgangsstøðið má tí vera, at tað ikki er loyvt at roykja á stovninum. Nærverkið má tó ásanna, at hetta hevur víst seg at verða trupult at gjøgnumføra, tí talan samstundis er um heimið hjá búfólkunum.

Nærverkið hevur ikki havt neyðuga orku til at orða ein yvirkskipaðan roykipolitikk, men vil í fyrsta umfari áleggja øllum leiðarum í Nærverkinum at síggja til, at omanfyri nevnda lóg verður fylgd á nøktandi hátt.

**Pkt. 8 Eftirlit**

**Viðv. eftirlitsskipan**

> Sum tað framgongur omanfyri av frágreiðingini um heilsufakligt eftirlit, er hesin parturin av eftirlitsskipanini virkin.
>
> Viðvíkandi námsfrøðiligum eftirliti við sambýlinum, er støðan m.a. merkt av trupulleikum, sum standast av skiftandi leiðslu í Trivnaðartænastuni. Av hesi orsøk steðgar fyrireikingin av hesum eftirliti upp.
>
> Ein annar týðandi trupulleiki er, at ongin lóggáva finst at gera námsfrøðiligt eflirlit eftir. Tað er tí trupult at skipa eitt námsfrøðiligt eftirlit við ongum fyriskipanum. Skotið er upp til fíggjarlógina 2008 at seta eina upphædd av til fyrireiking av námsfrøðiligum eftirliti. Um játtan fæst á fíggjarlógini 2008, er ætlanin hjá Nærverkinum at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við hesum máli.
>
> Fíggjarligt eftirlit er við stovninum, eins og tað er á øllum stovnum Nærverksins."

Umboðsmaðurin fór síðani undir viðgerð sína av málinum.

**Niðurstøða**

Hetta málið er ein uppfylging av frágreiðingini frá eftirlitsvitjan umboðsmansins í sambýlinum á Bóndaheygi 14, ið var framd tann 27. februar 2007.

Innlendismálaráðið hevur í skrivi, dagfest tann 11. desember 2007, boðað mær frá, at ráðið ætlaði at taka málið um at dagføra revsilógina uppaftur, beinanvegin tá ið nýtt landsstýri var skipað.

Eg fari at heita á landsstýriskvinnuna í lógarmálum, sum umsitur málsøkið revsi- og rættargangslóg, um at skipa fyri, at lóggávan á hesum økinum verður dagførd, soleiðis at rættarstøðan hjá teimum dømdu á Bóndaheygi 14 verður tryggjað. Eg fari at biðja landsstýriskvinnuna lata meg frætta, nær hetta verður gjørt.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur í skrivi, dagfest tann 10. januar 2008, boða mær frá, at arbeitt hevur verið við at fáa sett í verk reglugerð um umsiting av pensjón hjá búfólkum og aðrar reglur um virksemi á sambýlum. Reglurnar skuldu væntandi verið klárar at seta í verk í vár. Eg fari at biðja Almanna- og heilsumálaráðið lata meg frætta, hvussu gongur við hesum arbeiðinum.

Almanna- og heilsumálaráðið upplýsir, at orka ikki hevur verið til at endurskoða galdandi reglur um frælsistøku og at orða hesar í lóg. Eg fari at biðja Almanna- og heilsumálaráðið lata meg frætta, nær væntast kann, at farið verður í holt við arbeiðið.

Almanna- og heilsumálaráðið upplýsir harumframt, at arbeitt verður við at fyrireika, at danska psykiatrilógin verður sett í gildi í Føroyum. Eg fari at biðja Almanna- og heilsumálaráðið lata meg frætta, nær lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið.

Nærverk hevur í skrivi, dagfest tann 24. apríl 2008, sent mær frágreiðing um, hvat er hent síðani umboðsmaðurin var á eftirlitsvitjan á Bóndaheygi

14. Ávís viðurskifti hevur Nærverk funnið loysn á, meðan gongd er í øðrum málum. Nærverk nevnir, at arbeiðið við at gera eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri øll øki innan Nærverkið er farið í gongd. Eg fari at biðja Nærverk senda mær frágreiðing, tá ið tilbúgvingarætlanin er farin at virka.

Nærverk nevnir eisini, at ætlanin er at seta ein arbeiðsbólk til at arbeiða við at fáa eitt námsfrøðiligt eftirlit við stovnum undir Nærverki at virka. Eg fari at biðja Nærverk lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum málinum.

Viðvíkjandi útferðarloyvi til búfólk við dómi, upplýsir Nærverk, at sama mannagongd framvegis verður fylgd, tað vil siga, at tað er leiðarin fyri Trivnaðartænastuni, sum við støði í pedagogiskt fakligum úttalilsum frá starvsfólkunum á stovninum, tekur avgerð um tilmæli til fútan viðvíkjandi útferðarloyvum.

Eg fari í hesum sambandi at minna á niðurstøðu mína í frágreiðingini frá eftirlitsvitjan á Bóndaheygi 14, bls. 9-11. Í frágreiðingini verður staðfest, at tá ið útferðarloyvi skal gevast teimum dømdu á Bóndaheygi 14, ganga myndugleikarnir eftir: ”Justitsministeriets cirkulære af 15. november 1977 om meddelelse af friheder m.v. til personer, der i medfør af straffelovens § 68 eller § 69 er dømt til anbringelse i hospital for sindslidende (psykiatrisk sygehus eller sygehusafdeling) eller institution for åndsvage”. Sambært § 2, stk. 2 í rundskrivinum skal ein yvirlækni m.a. taka avgerð um, í hvønn mun tann dømdi kann verða á stovninum uttan starvsfólk, og hvørt tann dømdi kann fáa loyvi til at vera uttanfyri stovnin í upp til 3 tímar um døgnið uttan starvsfólk. Tá ið talan er um, at tann dømdi skal út um stovnin í longri tíð enn 3 tímar, og tá ið tann dømdi í einstøkum førum skal gista hjá familju, skal ein yvirlækni saman við statsadvokatinum taka avgerð um útferðarloyvi, jb. § 2, stk. 3 í rundskrivinum.

Sambært hesum eigur Nærverk at fáa eina læknaliga meting ella sjúkugreining til vega frá yvirlækna, sum kann liggja til grund, tá ið útferðarloyvi verður givið.

Eg fari enn einaferð at heita á Nærverk, um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Sambýlið á Bóndaheygi 14 hevur í skrivi, dagfest tann 11. desember 2007, boðað mær frá, at flestu av teimum viðurskiftum, ið eg fýltist á í frágreiðing míni frá eftirlitsvitjan á Bóndaheygi 14, nú eru komin í rættlag. Tó eru ávís viðurskifti, ið ikki enn eru í lagi. Greitt varð frá, at arbeitt varð við at gera støðulýsingar av búfólkum, tilbúgvingarætlan fyri stovnin, manuella skjalagoymslu og skáp til starvsfólkaupplýsingar, men at hetta enn ikki var komið á mál. Eg fari at biðja leiðsluna í sambýlinum lata meg frætta, tá ið hesi viðurskifti eru komin í rættlag.

Í frágreiðingini frá sambýlinum varð eisini greitt frá, at ein persónur, ið búði í sambýlinum, var so illa kropsliga brekaður og sjúkur, at tað ikki longur var forsvarligt, at hann búði í sambýlinum. Eftirfylgjandi havi eg fingið fráboðan

frá Nærverki um, at Nærverk hevur funnið annan hóskandi bústað til búfólkið. Eg geri tí ikki meira við hetta.

Harumframt greiddi sambýlið frá, at ávísar ábøtur viðvíkjandi fysisku búumstøðunum í sambýlinum ikki enn vóru gjørdar. Eg fari at biðja leiðsluna í sambýlinum lata meg frætta, hvussu gongur við hesum arbeiðinum.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður